GJALDSTOVAN

# Uppskot til rammusáttmála

Viðvíkjandi avsláttarskipan í samband við keyp av vørum á byggimarknaðinum
til landsins stovnar

millum

Gjaldstovan
Kvíggjartún 1
160 Argir
Føroyar

og

[navn á veitara]
[Adressa]
[Postnummar og býur]
[Land]
[eftir hetta “Veitarin”]

Innihald


1. Grundarlag ..... 3
2. Orðagreining ..... 3
3. Vav ..... 3
4. Heimild ..... 5
5. Prísir og mannagongd í samband við innkeyp ..... 5
6. Innkeyp ..... 6
7. Treytir viðv. marknaðarføring og sølu ..... 7
8. Hagtøl og frágreiðingar ..... 7
9. Samstarv ..... 8
10. Broytingar í sáttmálanum ..... 8
11. Uppsøgn og mishald ..... 9
    1. Uppsøgn ..... 9
    2. Mishald ..... 9
12. Force Majeure ..... 9
13. Avhenda til triðja part ..... 10
14. Trúnaður ..... 10
15. Endurgjald ..... 11
16. Træta ..... 11
17. Longd av sáttmála og lokadagur ..... 11
18. Undirskrift av sáttmála ..... 12

# 1. Grundarlag

Til henda rammusáttmálan eru hesi fylgiskjøl:

- Fylgiskjal A: Kravfesting
- Fylgiskjal B: Veitarans tilboð
- Fylgiskjal C: Veitarans avsláttur og prísir

# 2. Orðagreining

Við "arbeiðsdag" verður sipað til gerandisdagar frá kl. 8.00 – 16.00.

Við "keypara" verður sipað til Gjaldstovuna og aðrar stovnar, ið eru bundnir av rundskrivi nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum.

Við "sáttmála" verður sipað til henda rammusáttmálan við øllum tilhoyrandi fylgiskjølum og eftirfylgjandi ískoytum til henda sáttmálan.

Við "partar" verður sipað til keyparan og veitaran, í felag "partarnir".

Við "veiting" verður sipað til tær vørur og tænastur, sum eru lýstar í fylgiskjølunum A, B og C.

# 3. Vav

Sáttmálin fevnir um avsláttarskipan í samband við keyp av vørum á byggimarknaðinum til landsins stovnar, sum lýst í fylgiskjølunum A, B og C.

Allir stovnar, ið eru bundnir av rundskrivi nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum, hava rættin til at keypa inn eftir hesum sáttmála.

Gjaldstovan kann sjálvboðin og uttan kostnað loyva øðrum stovnum, ið ikki eru bundnir av rundskrivi nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum, at brúka sáttmálan sjálvbodnir. Hetta kann t.d. vera kommunur, skúlar v.m.

Keyparin er ikki bundin av at keypa inn eina ávísa mongd av vørum á byggimarknaðinum.

Sáttmálin er ikki galdandi fyri løgu- og byggiverkætlanir, har útbjóðingarlógin er galdandi, t.e. løgtingslóg nr. 106 frá 15. november 1984 um útbjóðing v.m.. Sáttmálin er ei heldur galdandi fyri byggiuppgávur, ið eru framdar av handverkarum uttanífrá, har byggitilfar er partur av uppgávuni.

Sáttmálin fevnir um avsláttarskipan í samband við keyp av vørum á byggimarknaðinum til landsins stovnar, har upphæddin er undir 50.000 kr. Keyp omanfyri 50.000 er framvegis fevnt av rundskrivi nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum. Sáttmálin forðar tó ikki stovnum at biðja um tilboð í samband við keyp undir 50.000 kr. Verður biðið um tilboð, skal avslátturin í minsta lagi svara til veitta avslátturin í sáttmálanum.

Sáttmálin verður undirskrivaður av Gjaldstovuni.

## 4. Heimild

Gjaldstovan hevur heimild at gera rammusáttmálar, herímillum avsláttarskipanir og príssáttmálar, fyri vørur og tænastur fyri alt landið.

## 5. Prísir og mannagongd í samband við innkeyp

Vørur kunnu flokkast í bíleggingarvørur og goymsluvørur.

Bíleggingarvørur eru vørur, ið ikki eru á goymslu hjá veitaranum, og sum verða keyptar til nettoprís, t.e. prísir sum ikki eru kendir frammanundan.

Goymsluvørur eru vørur, ið eru á goymslu ella eru skrásettar í søluskipanini hjá veitaranum. Goymsluvørur kunnu keypast inn til listaprísin, ið er galdandi á keypsdegnum, minus veitta avslátturin í prosentum í greinaða vørubólkinum ella í greinaðu vørusløgunum, sum tilboðsgevari hevur ásett áðrenn freistina fyri at lata inn tilboð. Goymsluvørur kunnu eisini keypast inn til nettoprísir, sum t.d. í samband við at heinta inn tilboð uppá 20 skrúvumaskinur. Nettoprísirnir skulu í hesum førum ongantíð vera hægri enn veitti avslátturin fyri vørurnar í greinaða vørubólkinum ella í greinaðu vørusløgunum.

<u>Samandráttur</u>

Um vøran er á goymslu, so skulu landsins stovnar antin

1) keypa vøruna til listaprísin, sum er galdandi á keypsdegnum minus veitta avslátturin fyri vøruna ella

2) biðja um tilboð uppá vørurnar sum svara til nettoprísin, har nettoprísurin altíð er lægri enn avslátturin.

Avslátturin, sum tilboðsgevari hevur ásett áðrenn freistina fyri at lata inn tilboð, er galdandi alt sáttmálaskeiðið.

Veitarin hevur skyldu til at upplýsa almennum stovnum um teirra rætt til at nýta henda sáttmálan.

## 6. Innkeyp

Keyparin kann keypa vørur og tænastur við at bíleggja frá veitaranum. Bílegging skal sendast til veitaran á:

Teldupostadressa: [Set inn teldupostadressu]

Keyparin skal móttaka váttan fyri allar bíleggingar. Veitarin kann loyva keypara at senda bíleggingar umvegis elektroniska skipan, um veitarin hevur eina slíka skipan.

Ein seðil skal heftast við hvørjum ordra, ið inniheldur:

- Navn á veitara
- Navn og nummar á sáttmála
- Navn og nummar á stovni
- Adressa hjá stovni
- Navn og nummar á vøru
- Nummar á rokning
- Linjunummar á rokning

- Tal av vørum
- Prísur við og uttan avsláttur, avsláttur skal síggjast á rokning
- Prísur við og uttan MVG
- Dagfesting fyri bílegging

Allar rokningar til stovnar skulu vera í formatinum OIO-UBL við tilvísing til nummar á sáttmála og stovni.

Rokningar fella til gjaldingar 30 dagar eftir dagfesting á rokning.

Vørur skulu kunna avhendast á adressu hjá stovnum kring alt landið allar arbeiðsdagar millum kl. 8.00 - 16.00. Avhendan uttan fyri hetta tíðarskeið kann avtalast partarnar í millum.

## 7. Treytir viðv. marknaðarføring og sølu

Um veitarin velur at selja vørur, ið eru fevndar av hesum sáttmála, til ein lægri prís enn sáttmálin ásetur, í samband við marknaðarføring ella líknandi tiltøk, skal keyparin hava rættin til sama prís. Veitarin skulu upplýsa keyparan um hetta.

## 8. Hagtøl og frágreiðingar

Veitarin skal, uttan kostnað, í seinasta lagi 30. januar á hvørjum ári, lata Gjaldstovuni hagtøl av søluni.

Um biðið verður um hagtøl í úrtíð, so skal veitarin lata inn hagtølini innan 5 yrkadagar uttan kostnað.

Hagtølini skulu skipast á sama hátt, sum á seðlinum í samband við keyp. Hagtølini skulu latast inn sum Excel fíla.

## 9. Samstarv

Veitarin skal áseta ein samskiftispersón, ið hevur ábyrgd av hesum sáttmálanum.

Veitarin og ábyrgdarin skulu tryggja, at øll starvsfólk kenna sáttmálan.

Ábyrgdarin skal hava fulltrú til at taka avgerðir vegna veitaran.

Veitarin skal senda eina skrivliga frágreiðing til Gjaldstovuna innan 5 yrkadagar, um veitarin fær kærur frá stovnum, ið eru bundnir av hesum sáttmála.

Partarnir eru samdir um at samstarva á skikkaðan hátt og at yvirhalda ásetingarnar í hesum sáttmálanum. Broyttar fyritreytir, sum hava við sær, at annar parturin ikki kann halda sín part av sáttmálanum, skulu verða fráboðaðar hinum partinum sum skjótast.

## 10. Broytingar í sáttmálanum

Allar broytingar til sáttmálan skulu boðast frá innan eina hóskandi freist. Broytingar verða framdar við einum ískoyti til sáttmálan.

Broytingar viðvíkjandi samskiftisupplýsingum hjá veitaranum, t.e. adressur, telefonnummur teldupostadressur, samskiftispersónar, og annars týðiligar villur í hesum sáttmálanum, fylgiskjølum v.m., sum t.d. skeivar tilvísingar, kann Gjaldstovan broyta uttan góðkenning frá veitara.

# 11. Uppsøgn og mishald

## 11.1 Uppsøgn

Keyparin kann siga henda sáttmálan upp við at senda skrivliga fráboðan við eini freist uppá 3 mánaðir seinast í einum mánaði.

Veitarin kann siga henda sáttmálan upp við at senda skrivliga fráboðan við eini freist uppá 12 mánaðir seinast í einum mánaði.

## 11.2 Mishald

Um veitarin ikki er mentur at liva upp til minstukrøv í Fylgiskjali A og krøvini í sáttmálanum í ásettu gildistíð, verður hetta mett sum mishald, ið heimilar keyparanum at siga upp sáttmálan.

# 12. Force Majeure

Partarnir kunnu ikki ábyrgdast fyri mishald orsakað av force majeure.

Force majeure verður lýst sum ein hending, sum partarnir ikki hava tamarhald á, og tí ikki hava møguleika at lúka treytirnar í sáttmálanum vegna kríggj, náttúruvanlukku, verkfall, alheimsfarsótt v.m.

Partarnir hava skyldu at manna tilbúgving um neyðugt.

Partarnir bera sjálvir sínar útreiðslur orsakað av force majeure.

## 13. Avhenda til triðja part

Partarnir kunnu ikki avhenda nakrar av sínum skyldum sambært sáttmálanum til triðja part uttan skrivliga góðkenning frá hinum partinum.

Gjaldstovan treytar sær rættin til at nokta avhending til triðja part. Hetta sjálvt um triði partur kann liva upp til treytirnar í sáttmálanum og útboðstilfarinum.

## 14. Trúnaður

Gjaldstovan er fevnd av løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina.

Partarnir hava tagnarskyldu um viðurskifti, sum partarnir fáa innlit í hjá hvørjum øðrum umvegis samstarvið eftir hesum sáttmála.

Tagnarskyldan heldur fram eftir, at sáttmálin er farin úr gildi.

## 15. Endurgjald

Partarnir hava endurgjaldsábyrgd sambært føroyskari lóggávu.

Um Gjaldstovan sigur sáttmálan upp vegna mishald, so skal veitarin gjalda endurgjald, sum svarar til útreiðslurnar, sum landið og stovnar hava av hesum.

Gjaldstovan átekur sær onga ábyrgd fyri stovnar, sum sjálvbodnir brúka sáttmálan.

Gjaldstovan hevur ikki ábyrgd mótvegis triðja parti viðvíkjandi sáttmálum, ið Gjaldstovan ikki varðar av. Veitarin hevur sjálvur ábyrgd mótvegis sínum undirveitarum.

Um komandi veitarin til henda sáttmálan er ein handilsfelagsskapur, skal hesin hava samábyrgd.

## 16. Træta

Træta skal, um møguligt, loysast partarnar í millum við samráðingum.

Træta skal loysast við dómstólarnar, um partarnir ikki kunnu loysa trætu við samráðingum.

## 17. Longd av sáttmála og lokadagur

Sáttmálin kemur í gildi sama dag, sáttmálin er undirskrivaður. Sáttmálin fer úr gildi uttan fráboðan 3 ár eftir dagin, sáttmálin varð undirskrivaður.

## 18. Undirskrift av sáttmála

Sáttmálin verður latin úr hondum í tveimum eintøkum, sum skulu skrivast undir av báðum pørtum.

Við at skriva undir sáttmálan tryggja partarnir, at persónarnir, sum skriva undir sáttmálan, hava fulltrú til at binda partin, hvørs vegna sáttmálin verður undirskrivaður.

| | |
|---|---|
| Fyri og vegna Keyparan: | Fyri og vegna veitaran: |
| Dagfesting: | Dagfesting: |
| ______________________________ | ______________________________ |
| Undirskrift | Undirskrift |